## Rógvi bjargaði javnleik

Hødd spældi í gjár ímóti Sandnes Ulf í næstbestu norsku fótbóltsdeildini. Nógvur vindur var, og tað órógvaði spælið í dystinum. Sandnes Ulf legði seg á odda í fyrra hálvleiki. Í seinna hálvleiki kom Hødd meira við í dystinum, og 10 minuttir fyri leiklok eydnaðist tað Hødd at javna. Málið kom eftir hornaspark, sum føroyski landsliðsspælarin Rógvi Jacobsen stútaði í málið.



## Høgni til Fremad Amager

17 ára gamli sandoyingurin, Høgni Midjord, fór í dag til Fremad Amager, har hann skal royndarvenja fram til hósdagin. Hóast unga aldurin, hevur B71-áleyparin, Høgni Midjord, víst seg sum ein sera vandamiklan áleypara í ársins útgávu av Formuladeildini, har hann hevur skorað tvey mál higartil í ár. - Eg fari fyri at vísa hvat eg kann. Eru teir áhugaðir, so taka vit tað harfrá, sigur Høgni Midjord við Portalin.

# Vistu ikki av 6-mannaførunum




*Í Havnar Róðrarfelag eru tey alt annað enn fegin um, at annars avblásti 6-mannafarsróðurin við kvinnum kortini var á skránni. Enntá við báti, sum als ikki var tilmeldaður*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í Havnar Róðrarfelag eru tey ørkymlað um støðuna, nú 6-mannafør við kvinnum kortini róðu**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á startlistanum, sum varð sendir miðlunum frá Róðrarsambandinum undan norðoyastevnuni, stóð bert eitt 6-mannafar við kvinnum á listanum. Nevnliga Gongurólvur. Reglurnar siga, at bátur, sum ikki ætlar at taka lut á FM-stevnu, skal frámeldast hjá Róðrarsambandinum, og tí má niðurstøðan vera, at tað bert var Gongurólvur, sum ikki hevði frámeldað bátin.

Og stóð tað til tey í Havnar Róðrarfelag, so varð róðurin av ongum. Kvinnurnar,s um annars høvdu ætlað sær at róð við Gongurólvi, vóru nevnliga farnar umborð aftur á Sílið, nú tær ikki høvdu nakran at kappast við, og sum so gekst hetta eftir ætlan, tá Sílið vann sín róður.

Hinvegin róðu 6-mannafør við kvinnum kortini. Jarnbardur var komin aftur á startlistan, og Gongurólvur varð hóast alt mannaður, og hóast blái báturin als ikki stóð á startlistanum, so kundu tey í Knørrafelagnum enn einaferð fegnast um gullmerki til kvinnumanningina.

- Nú er føroyskur kappróður vorðin eitt sjálvtøkuborð, har tú fert út á gøtuna í Havn at leita eftir fólki dagar fyri Fm-róður, fer til Klaksvíkar og kemur aftur við steypi og heiðursmerkjum um hálsin, verður millum annað sagt á heimasíðuni hjá Drekanum, har tey siga seg vera bæði vónbrotin og ørkymlað av støðuni, sum róðurin er komin í.

Og so kann leggjast afturat, at tíðirnar hjá 6-mannaførunum geva greiðar ábendingar um, at talan ikki var um manningar í serliga góðari venjing. Sammett við 5-mannafør við kvinnum var næstan ein minuttur á muni millum róðrarnar.




*Í harðari kapping við Hvassa eydnaðist Drekanum at vinna genturóðurin á norðoyastevnu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*




*Í Klaksvík er ógvuliga smáligt við kappróðri í ár. Tað nærmasta, sum Klaksvík kom einum heimasigri, var tá Sundabáturin vann róðurin fyri 6-mannafør við monnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

| Úrslitini á norðoyastevnu | |
|---|---|
| **5 mannafør dreingir** | |
| 1 Sílið | 5:26:13 |
| 2 Havfrúgvin | 5:35:14 |
| 3 Junkarin | 5:36:04 |
| 4 Tjaldrið | 5:43:22 |
| 5 Strípan | 5:45:13 |
| 6 Teistin | 5:49:11 |
| 7 Blikur | 5:52:14 |
| 8 Katla | 5:52:18 |
| 9 Tambar | 6:00:24 |
| **6 mannafør kvinnur** | |
| 1 Jarnbardur | 6:32:23 |
| 2 Gongurólvur | 6:40:24 |
| **5 mannafør gentur** | |
| 1 Drekin | 5:53:17 |
| 2 Hvassi | 5:55:11 |
| 3 Junkarin | 6:01:09 |
| 4 Jallurin | 6:03:12 |
| 5 Firvaldur | 6:05:04 |
| 6 Blikur | 6:11:01 |
| 7 Tambar | 6:13:01 |
| **5 mannafør kvinnur** | |
| 1 Sílið | 5:37:12 |
| 2 Frúgvin | 5:40:12 |
| 3 Erla Kongsdóttir | 5:46:02 |
| 4 Ritan | 5:48:18 |
| 5 Teistin | 5:49:08 |
| 6 Katla | 5:51:12 |
| 7 Báran | 5:52:08 |
| 8 Havfrúgvin | 6:00:08 |
| 9 Blikur | 6:08:24 |
| 10 Fípan Fagra | 6:26:02 |
| **6 mannafør menn** | |
| 1 Sundabáturin | 8:02:10 |
| 2 Tvørabáturin | 8:05:13 |
| 3 Riddarin | 8:10:20 |
| 4 Gongurólvur | 8:18:01 |
| 5 Lómur | 8:28:23 |
| 6 Rádni | 8:29:04 |
| 7 Jarnbardur | 8:49:14 |
| 8 Víkingur | 9:06:15 |
| **8 mannafør** | |
| 1 Heiðabáturin | 6:52:24 |
| 2 Argjabáturin | 6:56:21 |
| 3 Árnfirðingur | 7:01:13 |
| 4 Kvívíkingur | 7:07:05 |
| 5 Knørrur | 7:07:10 |

| FM-kappróður | | | 1 |
|---|---|---|---|
| **5-mannafør, dreingir** | **Stig íalt** | **Norðoyastevna** | **Norðoy: Sundalagsst.** |
| 1 Sílið | 7 | 7 | 7 |
| 2 Havfrúgvin | 6 | 6 | 6 |
| 3 Junkarin | 5 | 5 | 5 |
| 4 Tjaldrið | 4 | 4 | 4 |
| 5 Strípan | 3 | 3 | 3 |
| 6 Teistin | 2 | 2 | 2 |
| 7 Blikur | 1 | 1 | 1 |
| **6-mannafør, kvinnur** | | | |
| 1 Jarnbardur | 7 | 7 | 7 |
| 2 Gongurólvur | 6 | 6 | 6 |
| **5-mannafør, gentur** | | | |
| 1 Drekin | 7 | 7 | 7 |
| 2 Hvassi | 6 | 6 | 6 |
| 3 Junkarin | 5 | 5 | 5 |
| 4 Jallurin | 4 | 4 | 4 |
| 5 Firvaldur | 3 | 3 | 3 |
| 6 Blikur | 2 | 2 | 2 |
| 7 Tambar | 1 | 1 | 1 |
| **5-mannafør, kvinnur** | | | |
| 1 Sílið | 7 | 7 | 7 |
| 2 Frúgvin | 6 | 6 | 6 |
| 3 Erla Kongsdóttir | 5 | 5 | 5 |
| 4 Ritan | 4 | 4 | 4 |
| 5 Teistin | 3 | 3 | 3 |
| 6 Katla | 2 | 2 | 2 |
| 7 Jallurin | 1 | 1 | 1 |
| **6-mannafør, menn** | | | |
| 1 Sundabáturin | 7 | 7 | 7 |
| 2 Tvørabáturin | 6 | 6 | 6 |
| 3 Riddarin | 5 | 5 | 5 |
| 4 Gongurólvur | 4 | 4 | 4 |
| 5 Lómur | 3 | 3 | 3 |
| 6 Rádni | 2 | 2 | 2 |
| 7 Jarnbardur | 1 | 1 | 1 |
| **8-mannafør** | | | |
| 1 Heiðabáturin | 7 | 7 | 7 |
| 2 Argjabáturin | 6 | 6 | 6 |
| 3 Árnfirðingur | 5 | 5 | 5 |
| 4 Kvíkíkingur | 4 | 4 | 4 |
| 5 Knørrur | 3 | 3 | 3 |
| **10-mannafør** | | | |
| 1 Ormurin Langi | 7 | 7 | 7 |
| 2 Havnarbáturin | 6 | 6 | 6 |